## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi, um kvøldið veksur hann vindin upp í hvassan vind av vestri. Ælingur, men onkur sólglotti og hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum, seinnapartin veksur hann vindin upp í skrið av útnyrðingi. Ælingur, partvís kavi og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hann minkar vindin niður í lot av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið um frostmarkið.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum +1 og minus 3 stig.

# Nú kunnu tey ungu seta seg á listan

**Í døgunum 15. til 17. februar letur Norðurlandahúsið hurðarnar upp fyri 60 ungum, sum tora, duga og vilja. Øll sum eru 13 ár, men enn ikki 19 kunnu tekna seg og tað kunnu tey gera nú**

UNG OG LIST
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tann 15. februar fer aftur ein "Ung í Føroyum" stevna av bakkastokki í Norðurlandahúsinum.

Hetta er stevnan, har øll ung í landinum, sum hava listarlig áhugamál ella fáast við eitthvørt, ið hevur við list at gera, kunnu fara og hitta onnur við somu áhugamálum og læra nýtt av hvørjum øðrum og av kendum føroyskum og útlendskum listafólkum.

Øll sum eru 13 ár, men enn ikki 19 kunnu tekna seg

- Tað er her, at ung kunnu vísa øllum, hvat ungdómsmentan er, tá ung sjálvi seta dagsskránna, siga fyrireikararnir.

Ung í Føroyum er fyri øll ung, sum eru listarliga áhugaði, bæði til tey, sum hava nógvar royndir, til tey, sum akkurát eru byrjaði, ella til tey, sum bara hava hug at fara í gongd við nakað listarligt.

Tey kunnu royna nýggjar leiðir og mennast á sínum listaøki, men tað ber eisini til at royna okkurt annað enn tað, tey fáast við til dagligt.

Eitt dømi um hetta er, at í 2001 teknaði Eivør Pálsdóttir í seg til í sjónleiki og sendi myndir inn til listaframsýningina. Hvørja listagrein, hon vanliga fæst við, skuldi verið óneyðugt at sagt.

Á skránni er bæði listaframsýning og eins og tey verk í filmi, sjónleiki, tónleiki, dansi og øðrum, sum tey ungu hava fyrireikað frammanundan.

Tey ungu sleppa eisini at arbeiða í verksmiðjum, men tað verður eisini hugnakvøld og opin pallur.

Áðrenn stevnan endar, verður stór endasýningina og tá kann almenningurin eisini síggja, hvat er komið burturúr.

Verksmiðjuleiðararnir hesuferð verða Dánjal á Neystabø, tónleikur, Bárður Oskarsson, myndlist og teknirøð, Gunnvá Zachariassen, sjónleikur, Nikolaj Jensen, filmseffektir, Rakel Helmsdal, tíðindabólkur og Bernharður Wilkinson, samskipar av sunnudagssýningina. Verksmiðja verður eisini í dansi, men er leiðari ikki settur enn.

Afturat heimasíðuni, sum Ung í Føroyum hevur havt síðani 2005, hevur stevnan nú eisini sítt egna pláss á MySpace. Adressan er: http://www.myspace.com/ungiforoyum

Annars eru allar upplýsingar á www.ungiforoyum.info og tekningin byrjar í dag og er nú eisini online.



*Nú kunnu ung við listarligum áhuga hitta onnur ung við sama áhuga á stevnu, har tey læra og vísa fram*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -10 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | -- |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 6 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 1 |
| Moskva | -8 |
| Berlin | 7 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 16 |
| Athen | 16 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 4 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -3 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt djúpt lágtrýst, 962 hPa. í útsynning úr Íslandi fer eystureftir. Brúgvalagið í útsynning úr Føroyum fer í landnyrðing.




**Í dag:**
Fleiri lágtrýst, frá Íslandi til Vestur~Noreg fara eystureftir og geva væntandi høgætt á okkara leiðum hóskvøldið.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/12 kl. $06^{00}$ – 03/12. $06^{00}$. Hitin í gjár: 1,9°
Minsti hiti máldur í desember: -7,2° - Mesti hiti máldur í desember: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 02/12 kl. $06^{00}$ – 03/12. $06^{00}$
Avfallið higartil í desember: 88 mm

**Tiltøk í Miðlahúsinum**

**5. desember kl. 19.00**
*Evert Taube kvøld við Petur Eliasen og Niels Midjord*

**12. desember**
*Trapputing - Pedagogfelagið*

**15. desember**
*Musikskúlin*

**17. desember**
*Trapputing/Bitting um flogvøll*

FØROYABANKI
*stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum*

## VESTFALLSKYRRINDI

1. des. Seinna kvarter
3. des. Mánin longst frá jørðini
9. des. Tendring

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. Des | 02.39 | 14.59 | 01.39 | 13.59 | 01.54 | 14.14 | 04.39 | 16.59 | 05.39 | 17.59 | 00.54 | 13.14 | - | 12.14 | 02.54 | 15.14 | 03.54 | 16.14 | 02.24 | 14.44 | 03.39 | 15.59 |
| 5. Des | 03.18 | 15.38 | 02.18 | 14.38 | 02.33 | 14.53 | 05.18 | 17.38 | 06.18 | 18.38 | 01.33 | 13.53 | 00.33 | 12.53 | 03.33 | 15.53 | 04.33 | 16.53 | 03.03 | 15.23 | 04.18 | 16.38 |
| 6. Des | 03.58 | 16.18 | 02.58 | 15.18 | 03.13 | 15.33 | 05.58 | 18.18 | 06.58 | 19.18 | 02.13 | 14.33 | 01.13 | 13.33 | 04.13 | 16.33 | 05.13 | 17.33 | 03.43 | 16.03 | 04.58 | 17.18 |
| 7. Des | 04.38 | 16.58 | 03.38 | 15.58 | 03.53 | 16.13 | 06.38 | 18.58 | 07.38 | 19.58 | 02.53 | 15.13 | 01.53 | 14.13 | 04.53 | 17.13 | 05.53 | 18.13 | 04.23 | 16.43 | 05.38 | 17.58 |
| 8. Des | 05.19 | 17.41 | 04.19 | 16.41 | 04.34 | 16.56 | 07.19 | 19.41 | 08.19 | 20.41 | 03.34 | 15.56 | 02.34 | 14.56 | 05.34 | 17.56 | 06.34 | 18.56 | 05.04 | 17.26 | 06.19 | 18.41 |

Lesið Sosialin